Vikuskiftis Sosialurin
Nr. 34 - 16. februar 2007

## Lítið føroyskt á listanum

Føroyskur tónleikur er illa umboðaður á 15 teimum bestu í løtuni. Tað er Nelly Furtado við All Good Things Come To An End liggur á ovastu rók hesa vikuna. Meðan føroyskur tónleikur eigur botnin. Tað føroyska lagið, ið klárar seg best í løtuni er útgávan hjá The Dreams av Babu á 9. plássi. Hini føroysku løgini liggja á teimum trimum aftastu plássunum, Knúsandi løgur við Flemming Petersen liggur á 13. plássi, Don't Want You To Wake Up við Teiti á 14. plássi og Bangin við Villmonnum á 15. plássi. Komandi viku kann støðan broytast, tá besti nýggi bólkur í Føroyum í 2006 Boys In A Band sleppur at royna seg við Super Contagious.

## Føstulávints vikuskifti í Glitni

Fríggjakvøldið fer ein nýggjur táttur innan vælumtókta karaoke virksemið av bakkastokki í Glitnir.

Frá 23.30 verður "country karaoke" á skránni – tú kanst verða stjørna á jøvnum føti við Alan Jackson, Willie Nelson, Dolly Parton og øll tey. Tey sum taka mikrofonina eru sjálvandi við í dráttinum um ferðina til Mallorca. Leygarkvøldið verður stórur føstulávintsdansur við dansibólkinum Twilight. Grýlubúni eingin forðing, ókeypis atgongd til 23.30

## Rætting

Av óvart er Brasilia komin at standa sum eitt land, har føroyingar ættleiða frá, og at ættleitt verður frá Korea, tí har stendur illa til, á síðu nýggju í hósdagsblaðnum. Hetta er ikki rætt. Ongi børn verða ættleidd frá Brasilu, og flest øllum kunnugt stendur væl til í Korea í dag.

# Rednex spæla tvær konsertir í kvøld



**Svenski bólkurin Red Nex fær úr at gera í kvøld, Fyrst spælir bólkurin í Fuglafirði, áðrenn leiðin gongur til Havnar, har tey fara á pall við sínum dance/country í Rex.**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fyrra konsertin verður á fríggjakvøldið á midnátt í Mentanarhúsinum. Síðani verður farið til Havnar at spæla konsert í Rex. Tann konsertin verður beint áðrenn kl. 3 um náttina, skrivar byin.fo. Tað skilst á fyrireikaranum Rúna Djurhuus, at nýinnkeypta Hummer limosinan verður tikin í nýtslu til at fáa bólkin úr Fuglafirði til Havnar.

Svenski kult-bólkurin hevði sítt altjóða gjøgnumbrot miðskeiðis í 90-árunum við sínum serliga dance-country-ljóði. Umframt "Cotton Eye Joe" frá 1994 hittaði bólkurin við løgunum "Old Pop In An Oak" og "Wish You Were Here".

Síðani altjóða gjøgnumbrotið hava Red Nex spælt nógv ymsastaðni í heiminum, tó uttan at bólkurin hevur megnað, at sloppið framat hittlistunum aftur. Fríggjakvøldið verður so fyrstu ferð, at Red Nex spæla í Føroyum.

# Tað regnar í Rex

Sum vant, verður livandi tónleikur í Rex um vikuskiftið, og leygarkvøldið verður tað so All That Rain, ið fer at undirhalda. Bólkurin fer at spæla bæði útlendskt tilfar og egin løg – gomul sum nýggj. All That Rain, sum hevur umleið 10 ár á baki, hevur havt skiftandi manningar. Seinastu árini hevur oddamaðurin verið Rókur Jákupsson, ið á Planet Awards varð valdur til ársins sangara. Orkumikli sangarin, ikann syngja hvat sum helst høgt sum lágt. All That Rain hevur fyri tað mesta spælt á føroyskum dansistøðum, og leygarkvøldið stendur so Rex fyri turni.



Ítróttarsosialurin altíð við har tað hendir